Umhvørvisflokking Klaksvíkar kommuna

Flokking av virkjum og virksemi staðsett í byggisamtyktini fyri Klaksvikar kommunu.

Umhvørvisflokkingin er ein meting av, hvussu stór fjarstøða er neyðug millum virkir og bústaðir fyri at sleppast kann undan, at bústaðarøkið fær ampa av virkjum og at sleppast kann undan at virkir seinni fáa skerpaðið umhvørviskrøv. Umhvørvisflokkingin er ein treyt fyri at kunna gera bæði differentieraðar vinnuøkir og integreraðar býlingar. Umhvørvisflokkingin skal samtykkjast í avvarandi nevndum, sum fyri Klaksvíkar Kommunu eru tekniska nevnd og í býráðnum.

Flokkingin er býtt upp í 7 flokkar, alt eftir hvussu dálkandi virkið verður mett at verða.

Flokkur 1 eru virkir við lægst umhvørvisligum ampum og flokkur 7 eru virkir, ið hava stóra ávirkan á umhvørvið. Virkir innan sama virkisslag kunnu lokaliserast í fleiri flokkar. Hetta kemst av, at tað kann verða stórt fjølbroytni innan eitt virkislag.

Um eitt virki setur tiltøk í verk, fyri at minka um dálking ella annan ampa, sum t.d. nýtsla av reinari teknologi, kann virkið í hesum førinum flokkast lægri, t.e. ein lægri fjarstøða til bústaðir. Harafturímóti kann tað gerast neyðugt at flokka eitt virki hægri, um talan er um eitt virki, sum dálkar meiri enn vanligt.

Frástøðurnar eru ikki fráleikakrøv, ið skulu yvirhaldast, men heldur skal hetta brúkast sum ein leiðbeining um fraleika millum virkir og bústaðir. T.d. tá talan er um vinnuøki í eini miðstaðarbygging, har ynski er um stóran frekvens av ymiskari ferðslu og dynamikki, kann verða torført at vísa á fráleikakrøv.

Flokkur 1
Umfatar virkir, ið ikki eru til nevnuligan ampa fyri sítt umhvørvi og tí kunnu integrerast í bústaðir. Virkir í hesum flokkinum eru serliga handlar við og uttan verkstøð, skrivstovur og annað liberalt virksemi. Frástøðan til bústaðir er fyri henda flokk eingin, og kunnu hesi virkir tí eisini staðsetast í einum býlingi.

Flokkur 2
Umfatar virkir, ið geva orsøk til minni ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi og kann staðsetast í øki, har tað eisini eru bústaðir. Virkir í hesum flokkinum eru serliga minni virkir sum bókbindarar, elektronikk verkstøð og t.d. starvstovur. Frástøðan til bústaðir, er fyri henda flokk uml. 20 metur.

Flokkur 3
Umfatar virkir, ið geva orsøk til ávirkan á sítt umhvørvi, serliga orsakað av uttandura aktiviteti og kann staðsetast í ídnaðarøki evt. í randarøki, sum minni dálkandi virkir.
Virkir í hesum flokkinum eru serliga virkir sum tænastuvirksemi og handverkstøð.
Frástøðan til bústaðir, er fyri henda flokk uml. 20 - 50 metrar.

Flokkur 4
Umfatar virkir, ið geva ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi, men eru tey lættastu av teimum tungu framleiðsluvirkjunum. Kann staðsetast í einum ídnaðarøki. Virkir í hesum flokkinum eru serliga matvøruvirkir og t.d. minni virkir sum bilaverkstøð via sproytikabinu. Frástøðan til bústaðir, er fyri henda flokk uml. 50 - 100 metrar.

Flokkur 5
Umfatar virkir, ið hava størri ávirkan á sítt mærmasta umhvørvi. Kann staðsetast í einum ídnaðarøki. Virkir í hesum flokkinum eru serliga maskinvirkir, betongvirkir og t.d. virkir sum framleiða evnir so sum málingsvørur. Frástøðan til bústaðir, er fyri henda flokk uml. 100 - 150 metrar.

Flokkur 6
Umfatar virkir, ið hava størri ávirkan á sítt mærmasta umhvørvi. Kann staðsetast i størri ídnaðarøki, har fráleiki til grannar kann haldast. Eisini kann staðsetingin verða í vinnuøkjum, har bert virkir við serligum fráleikatørvi liggja. Virkir í hesum flokkinum eru størri maskin- og betongvirkir, sláturvirkir og t.d. asfaltvirkir. Frástøðan til bústaðir,

er fyri henda flokk uml. 150 - 300 metrar.

Flokkur 7
Umfatar virkir, ið hava størri ávirkan á sítt mærmasta umhvørvi, kann staðsetast i størri ídnaðarøki, har fráleiki til grannar kann haldast. Eisini kann staðsetingin verða í vinnuøkjum, har bert virkir við serligum fráleikatørvi liggja. Virkir í hesum flokkinum eru orkuverk, framleiðsla til heilivágs- og pesticidvinnuna. Frástøðan til bústaðir, er fyri henda flokk minst 500 metrar.

Flokkur 7 eru virkir, ið geva orsøk til umfatandi ávirkan á umhvørvið og tí vanliga seta serlig krøv til staðseting. Staðseting eigur at verða í økjum, ið eru til virkir og endamál, sum halda neyðugu frástøðuna til grannar. Staðseting kann í ávisum førum verða í 4. grundumráði, um ein VVM kanning av verkrkætlanini fyriliggur.

Dømi um virkir og verkætlanir, ið kunnu verða í hesum flokki eru: framleiðsluvirkir til heilivág og pesticidir, størri skipasmiður og onnur størri framleiðsla, flogvallir, skjótibanar, koyribreytir av ymiskum slag. Undir vanligum umstøðum verða hesi virkir og endamál ikki tikin við í planleggingini, men verða staðsett serskilt og ofta við meira nágreiniligum frágreiðingum um árin á umhvørvið (VVM-kanning) og grannar.

Frástøðan, ið er nevnd undir ymisku flokkunum er serliga ætlað til frástøðu til bústaðir. Eisini kann frástøða verða í mun til annað virksemi í einum øki, har blandað vinnulív er staðsett. Hetta vil aloftast vera vinna, ið er tengd at handilsvinnu, hotelvinnu og skrivstovuvirksemi.

Um frastøðan verður mett í mun til aðrar vinnur og vinnubyggingar, io eru viðkvæmar fyri ljóði, høgum frekvensi av tungari ferðslu v.m., bindur hetta vinnustykkini í økinum til ikki at broyta ásetingarnar fyri hesi vinnustykkir.

Kelda: Miljøstyrelsen í Danmark